Tórshavnar Listaskúli 2003/2004

Nýggjar avgreiðslutíðir
Mánadag til hósdag kl. 15.30 - 19.00
Telefon 31 77 55
Kvoldskulin@torshavn.fo

Skúlin byrjar 20. oktober, um ikki onnur dagfesting er tilskilað.

Treytað av nóg stórari undirtøku og myndugleikanna góðkenning, bjóðar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli undirvísing í hesum lærugreinum skúlaárið 2003/2004 :

ROYNDARFYRIREIKANDI UNDIRVÍSING 9. - 10. FLOKKUR

Floksnr. 500

Føroyskt, danskt, enskt, týskt, rokning/stoddfrøði, alisfrøði, evnafrøði.

Undirvíst verður í Kommununuskúlanum

Kostnaður kr. 350,- fyri hvørja lærugrein.

DUGNASKAPARROYND Í SIGLING

Floksnr. 505

Mánakvoldið 6. okt. 2003 kl. 19.00 byrjar dugnaskaparskeið í sigling á Føroya Sjómannsskúla.

Undirvíst verður mánakvøld og mikukvøld kl. 19.00 - 22.30.

Skeiðið endar við prøvtoku í apríl 2004.

Prógvið gevur tær rætt til at føra skip upp til 99 bruttotons í heimasjógvi, um annars treytirnar við siglingartíð, sjón- og lækknáttan eru í lagi. Umframt kravdu lærugreinirnar siglingarlæra, skipstøkni, sjóreglur og stoddfrøði verður eisini undirvíst í týðan av veðurkortum. Í siglingarlæru verður stórur dentur lagdur á frálæru í GPS.

Kostnaður kr. 650,-

DUGNASKAPARROYND Í MOTORLÆRU

Floksnr. 510

Maskinlæra, ravmagnslæra, kolitøkni, eldslokking og tænastukunnleiki.

Dugnaskaparprógvið veitir rættindi at passa motorar við framtøkumegi upp til 678 HK í heimasigling, t.e. innan fyri 200 fjórðingar.
Undirvísingin verður á Maskinmeistaraskúlanum hóskvøld kl. 19.00 - 22.30
Byrjað verður 23. okt. 2003. Tilmelding á tlf. 31 77 55

Kostnaður kr. 650,00

VEVING, TILSKERING, SEYMING OG YMISKT HANDARBEIÐI

Floksnr.	Gjald			
PLANTULITING/ SPINNING				
1001	kr. 680,-	Týskvøld	19.00 - 22.30	Margit Glerfoss og
1002	kr. 680,-	Hóskvøld	19.00 - 22.30	Herbjørg Dalsgaard Um høli fæst til vega
VEVING - skaft-, mynda- og rammuveving				
1003	kr. 1.140,-	Týskvøld	18.00 - 21.30	Poulina Jensen Gamla Reinsarið
1004	kr. 1.140,-	Hóskvøld	18.00 - 21.30	- -
1023	kr. 760,-	Friggjadag	13.30 - 17.00	Poulina Jensen Kollafjørður
TILEVNING - tekning, máling, leir, og silkimáling				
1505	kr. 680,-	Týskvøld	18.00 - 21.30	Arngerð Joensen Eysturskúlin, inngongd í Dj.i Geilgøtu
Akvarel og frihondstekning Vikuskiftisskeið				
1506	kr. 650,-	3 vikuskifti fyri jól 5 vikuskifti eftir jól		Arngerð Joensen Listaskúlin Kongagøta 7
LEIRARBEIÐI / KERAMIKK				
1511	kr. 680,-	Hóskvøld	18.00 - 21.30	Guðrið Poulsen Kommununuskúlin
1512	kr. 590,-	Hóskvøld	19.00 - 21.35	Ása í Jákupsstovu Lærarastúlin
POSTALÍNSMÁLING				
1508	kr. 680,-	Mánadag	17.00 - 20.30	Rakul Dam og Judith Ámastein Kommununuskúlin teknistovan
1515	kr. 680,-	Mikudag	17.00 - 20.30	Rakul Dam og Judith Ámastein Kommununuskúlin teknistovan
ARBEIÐI VIÐ TRÆ				
Floksnr.	**Gjald**			**LÆRIÐ AT DREYA**
2000	kr. 680,-	Mánakvøld	19.00 - 22.30	Sigmund Sørensen Eysturskúlin, inngongd í Dj.i Geilgøtu
2002	kr. 680,-	Hóskvøld	19.00 - 22.30	Verner Hansen Eysturskúlin, inngongd í Dj.i Geilgøtu
TRÆSMÍÐ				
2009	kr. 680,-	Týskvøld	19.00 - 22.30	Búi Brattaberg Eysturskúlin, inngongd í Dj.i Geilgøtu
LÆRIÐ AT SKERA Í TRÆ, skefta knívar og gera sliðrar				
2003	kr. 680,-	Mikukvøld	19.00 - 22.30	Nigro Arnearson Eysturskúlin, inngongd í Dj.i Geilgøtu
SMÍÐ - MODELLBÁTAR OG -SKIP				
2005	kr. 680,-	Mánakvøld	19.00 - 22.30	Alfred Gulbein Kommununuskúlin
2006	kr. 680,-	Mikukvøld	19.00 - 22.30	- -
LÆRIÐ AT UMVÆLA OG POLSTRA GAMLAR MØBLAR Ikki ov stórar møblar				
2007	kr. 680,-	Mánakvøld	19.00 - 22.30	Mortan Blásvær Rasmusargøta 4
2008	kr. 680,-	Týskvøld	19.00 - 22.30	- -
HANDVERK OG HANDALIGT ARBEIÐI				
Floksnr.	**Gjald**			**BÓKBINDING**
2500	kr. 680,-	Mánakvøld	18.45 - 22.15	Dagmar Jacobsen Brúni Skúli
2501	kr. 680,-	Týstdag	14.45 - 18.15	Dagmar Jacobsen Brúni Skúli
2502	kr. 680,-	Mikukvøld	18.45 - 22.15	Dagmar Jacobsen Brúni Skúli
2504	kr. 680,-	Hósdag	14.45 - 18.15	Dagmar Jacobsen og Sonja Dalsgaard Brúni Skúli -
BEIN- OG HORNARBEIÐI				
2506	kr. 680,-	Mánakvøld	19.00 - 22.30	Tórur Petersen Listaskúlin Kongagøta 7
STEINSLÍPING / SILVURARBEIÐI				
2507	kr. 680,-	Týskvøld	19.00 - 22.30	Tórur Petersen Listaskúlin Kongagøta 7
2508	kr. 680,-	Mikukvøld	19.00 - 22.30	- -
2509	kr. 680,-	Hóskvøld	19.00 - 22.30	- -
FOTO OG VIDEO				
Floksnr.	**Gjald**			**VIDEOLÆRA / UPPTØKA-byrjanarskeið** Byrjar 1 feb. 2004
KREATIV SKRIVING				
Floksnr.	**Gjald**			**KREATIV byrjar 9. okt.**
4010	kr. 680,-	Hóskvøld	19.30 - 22.05	Rakel Helmsdal Sankta Frans Skúli
		Og 5 leygardagar á 5 tímar		www.rakelhelmsdal.com
DANSUR				

Floksnr.	Gjald			**YMISKIR DANSIR (enskur dansur)** Byrjanarflokkar 8. okt. - 17. des. 2003
4015	kr. 480,-	Mánakvøld	19.00 - 20.30	Mia Cameron, Arnfríða Kommununuskúlin ovara høll
4016	kr. 480,-	-	20.30 - 22.00	og Jørgen Rubeksen -
SKEIÐ Í " ALEXANDERTEKNIKKI"				
Lær at brúka kroppin rætt				
4009	kr. 900,-	Ídagunum 8. - 12. oktober		Carsten Møller
KROPPUR OG RØDD				
KROPPUR OG RØDD				
4008	kr. 680,-	Mikukvøld	19.00 - 22.30	Sanne Storm
SJÓNLEIKUR				
DRAMA - Ungdómsbólkur 14 til 22 ár				
4028	kr. 480,-	eftir nærri avtalu		Hedvig Vesterlund Sjónleikarahúsið
TELDUSKEIÐ				
Floksnr.	**Gjald**			**TEKSTVIÐGERÐ - WINDOWS**
		Flokkur 1byrjar 29 okt. 2003		
520	kr. 480,-	Mánakvøld og hóskvøld 18.30 - 20.00		Páll Poulsen Kommununuskúlin
		Flokkur 2 byrjar 12. jan. 2004		
521	kr. 480,-	Mánakvøld og hóskvøld 18.30 - 20.00		Páll Poulsen Kommununuskúlin
TILBOÐ TIL TUNGHOYRD OG DEYV				
Floksnr.	**Gjald**			**ÍTRÓTTUR FYRI DEYV**
		Tilmelding	tlf. 31 75 97	
8079	kr. 300,-	Hóskvøld	19.30 - 21.10	Maria Ellefsen Læraraskúlin
FØROYSKT, FREMMANT MÁL O.A.				
Floksnr.	**Gjald**			**LESING OG SKRIVING FYRI LESIVEIK/ORÐBLIND**

ítróttur

Nr. 185 • mikudagur • 1.oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

2nd Klaksvík International

Ólavur Simonsen er ein av teimum fimm føroyingunum, sum taka lut í 2nd Klaksvík International

Um eina viku sleppa fimm føroyingar at royna seg í Klaksvík móti stórmeistara og altjóða meistarum kring grannalond okkara. Telvað verður í døgunum 7-11. oktobur

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Tvær IM-kappingar í norðoyggjum innan eitt ár. Óhugsandi fyri fáum árum síðani. Altjóða telving hevur góðar dagar norðanfyri Hórisgøtu, og tað eigur nú fráfarandi formaðurin (Rani legði frá sær leygardagin á ársaðalfundinum hjá TSF) í Talvsambandi Føroyar Rani Nolsøe heiðurin fyri. Hann hevur nevnliga verið høvuðsskipari av kappingunum báðum, har tann fyrra varð telvað á Viðareiði í oktobur í fjør. Í ár verður telvað í mentanarhúsinum Skálanum sunnanfyri fótbóltsvøllin.

Størsta einstaka hendingin hesi fýra ár við Rana sum formanni, var sjálvsagt Kasparov vitjanin í juni 2001. GM-kappingin í ár 2000 í Norðurlandahúsinum, eins og IM-kappingarnar í fjør og tann nú komandi kappingin í Klaksvík hava sanniliga eisini sett sína positivu spor í føroyskari telving. Barnatelvingin er somuleiðis í blóma og vælskipað kring landið, samstundis sum figgjarliga støðan er vorðin væl sunnari.

Spennandi avbjóðingar

Føroysku telvararnir eru fimm í tali, eins og útlendingarnir eru. Niðanfyri er luttakaralistin, við altjóða ratingtølunum nevnd.

Luttakararnir:

IM Kim Pilgaard, Danmark	2459
IM Klaus Berg, Danmark	2434
IM Johan Erikson, Svoríki	2414
GM Colin McNab, Skotland	2379
Flóvin Tór Næs Føroyar	2337
IM Sævar Bjarnason Ísland	2284
Heini Olsen Føroyar	2264
Ólavur Simonsen Føroyar	2261
Martin Poulsen Føroyar	2252
Hans Kristian Simonsen Føroyar	2240

Danin Kim Pilgaard vann á Viðareiði í fjør, og er eisini ratingfavorittur í ár. Skotski stórmeistarin McNab hevur seinastu árini mist hópin av ratingstigum, men ein stórmeistari kann altíð finna eyka kunnleika fram tá neyðugt er, og telist hann sjálvsagt eisini millum favorittarnar. Klaus Berg er ein sterkur og støðugur altjóða meistari við eitt nú nógvum royndum í danska landsliðsbólkinum.

Føroyingarnir hava góðir vónir. Flóvin hevur helst nú lagt óhepnu NM-kappingina herfyri aftur um bak, og kemur við nógvum altjóða royndum til Klaksvíkar. Heini Olsen er á heimavølli og tá kann alt henda. Ólavur varð besti føroyingur á Viðareiði í fjør, og unglingarnir báðir Martin og Hans Kristian eru okkara bestu talentir og kunna saktans yvirraska rætta vegin.

Føroya besta kort, John Arni Nilssen mátti tíverri geva avboð, hóast hugurin var góðir. Honum vantar bert ein IM-norm afturat sínum tveimum fyri at kalla seg altjóða meistara.

Kravið hjá føroyingunum til ein IM-norm er seks stig av nýggju møguligum. Telvað verður dupultumfar í fýra dagar, uttan seinasta dagin, 11. oktober, tá nýggjunda umfar verður leikt.

www.faroechess.com.

Fylgið við á føroysku talvheimasíðuni, har øll talvini verða víst beinleiðis. Á heimasíðuni verða eisini frásagnir, myndir o.a at síggja og lesa. Dómari verður danin Mogens Nielsen, sum nú er vælkendur í føroyskari telving.

Talvið hesa vikuna

Kasparov telvar í løtuni í evropeiska meistaraskapinum fyri lið, sum verður leikt á oyggjuni Kreta. Fleiri superstórmeistarar luttaka somuleiðis, so sum Shirov, Grischuk, Svidler, Adams, Ivanchuk og Bareev. 72 ára gamli Korchnoi luttekur eisini, og leikti hann eitt nú javnt móti føroyavininum Sokolov, sum nú hevur heili 2693 í rating, í øðrum umfari.

EM fyri lið fevnir um sjey umfør, har tvey umfør í skrivandi løtu eru telvað.

Kasparov valdi ikki at vera á russiska liði sínum Ladya Kazan í øðrum umfari mánadagin, tá írski mótstaðumaðurin "bert" hevði 2128 ratingstig. Men á fyrsta leikdegi vann hann sannførandi á GM Chuchelov (2608).

Kasparov,G (2830) - Chuchelov,V (2608)
EM fyri lið (1), 28.09.2003

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.Fc2 c5 5.dxc5 0—0 6.a3 Bxc5 7.Rif3 b6 8.Bf4 Rih5 9.Bg5 Be7 10.h4 (Longu nú sæst at Kasparov er í álopshýri) 10...Bb7 11.0—0—0 Ric6 12.e4 Rif6 13.e5 Rig4 14.Bf4 Rc8 15.Kb1 f5 16.exf6 Rixf6 17.Rig5 Fe8 18.Rib5 e5 19.Bd3! (Ótrúliga frekt og djarvt telvað av heimsins besta telvara! 19...e4 (Um svartur tekur bispin: 19...exf4 20.Bxh7+ Kh8 21.Rhe1 og hvítur hevur í roynd og veru fyrimun hóast bisp minni. Svartur stendur kroystur og einki útlit eru fyri betring. Tí valdi svartur ikki at taka ímóti offrinum) 20.Be2 h6 21.Rid6! Kasparov er ikki til at steðga) 21...Bxd6 22.Bxd6 hxg5 23.hxg5 Rih7

Støðan eftir 23...Rh7

24.Rxh7! Djúpt offur. Svarið og úrslitið av offrinum kemur tríggir leikir seinni 24...Kxh7 25.Bxf8 Fxf8 26.Fxe4+ Kg8 27.Fd5+ Tað verður mát um kongurin fer á h7 ella h8. Ff7 er tí einasta svar, men so leikar Kasparov 28.Fxf7 Kxf7 29.Rxd7+ og síðani Rxb7 og Kasparov hevur tríggjar finnur meir. Svartur gavst tí 1—0